## Um valdu nevndarlimirnar í Landsbanka Føroya

1) **Zvonko Mrdalo**
Útbúgvin búskaparfrøðingur frá Oxford í 2004 og hevur síðani tikið eina Phd í búskaparfrøði í Aberdeen í 2012. Hann arbeiðir í løtuni á Fróðskaparsetrinum. Hann hevur harafturat arbeitt hjá Atlantic Petroleum, Spf/ 14, Hagstovu Føroya og AUPEC (UK) og hevur hann verið limur í Búskaparráðnum. Zvonko hevur sostatt førleikar innan búskaparfrøði, fígging og kredittmeting og búskapin í Føroyum.

Ólavur Christiansen, búskaparfrøðingur, er varalimur.

2) **Elisabeth Eldevig**
Útbúgvin fiskivinnufrøðingur frá Lærda Háskúlanum í Tromsø í 1987. Hon hevur starvast sum stjóri í Samfisk, á Føroya Handilsskúla á Kambsdali har hon undirvísti í Altjóða búskapi og fiskivinnu og hjá Framherja. Hon hevur eisini verið forkvinna í Jarðargrunninum og Búnaðargrunninum og hevur eisini verið limur í Búskaparráðnum. Elisabeth hevur førleikar innan búskaparfrøði og hevur serliga gott innlit í fiskivinnuna í Føroyum.

Una Joensen, búskaparfrøðingur, er varalimur.

3) **Kristoffur Laksá**

Útbúgving M.S.SC í stjórnmálafrøði, umframt at hava merkonomútbúgvingar innan fígging, roknskap, starvsfólkaleiðslu og fyriskipan. Hann er nevndarlimur og samráðingarleiðari hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og granskar og undirvísir parttíð á Fróðskaparsetrinum. Kristoffur var stjóri og nevndarformaður á P/F Estra 1989-2015. Kristoffur hevur seinastu 30 árini verið nevndarlimur í fleiri vinnuligum fyritøkum umframt luttikið í einum stórum tali av arbeiðsbólkum, sum eru settir av politiska myndugleikanum ella av áhugafelagsskapum innan vinnupolitik og búskaparlig viðurskifti. Hann hevur sostatt vitan innan fígging og holla vitan um búskapin í Føroyum

Fróði Magnussen, búskaparfrøðingur, er varalimur

**4) Ninna Herdis Danielsen**
Útbúgvin MSc in International Banking & Financial Services, University of Reading, eins og hon hevur tikið MSc í búskaparfrøði á lærda háskúlanum í Ålborg. Starvast í dag hjá BP. Hon hevur arbeitt í bankanum, Credit Agricole 2001-2007, og síðan hjá BP Oil International har hon framvegis starvast. Hjá BP hevur hon arbeitt á ymiskum deildum, við váðameting, íløgum, váðastýring og ymiskum modellum innan hesi øki. Seinastu tíðina hevur hon arbeitt sum projektleiðari. Ninna hevur sostatt hollar førleikar innan fígging og váðameting.

Matthea Hilduberg, búskaparfrøðingur, er varalimur

5) **Edvard Heen**
Útbúgvin M. sc. econ., Finance, strategic planning, í 1984. Starvast í dag sum stjóri í almannaverkinum. Edvard hevur drúgvar royndir innan bæði tryggingar og bankavirksemi. Hann hevur eitt nú starvast sum varastjóri hjá norska BBS (clearing sentralur hjá bankum), og í Føroyum bæði sum deildarstjóri í Bank Nordik og stjóri hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Hevur sostatt vitan innan banka- og tryggingarvirksemi, og breitt innlit í føroyska fíggjargeiran.

Hans Ellefsen, búskaparfrøðingur, er varalimur

6) **Jan Otto Holm**
Útbúgvin cand. merc. innan fígging og roknskap í 1995. Hann hevur arbeitt innan virðisbræva- og fíggjarognarumsiting hjá bankum og tryggingarfeløgum í Føroyum og í Danmark. Ídag hevur Jan Otto sítt egna virki, sum veitir ráðgeving innan fíggjar- og íløguviðurskiftir. Harumframt undirvísir Jan Otto á handilsskúlanum og bankaskúlanum og situr eisini í ymsikum nevndum. Hann hevur sostatt holla vitan um føroyska fíggjargeiran, tryggingarvirksemi og búskapin.

Poula M. Kass, marknaðarføringsbúskaparfrøðingur og MA í lóg , er varalimur